## FÓLKATINGSVALIÐ 2001

# Sambandsríki ella fullveldisoyggjar valið er okkara

**Kaj Leo Johannesen**
*Sambandsflokkurin*



Fólkatingsvalið er byrjanin uppá eina nýggja sjálvstýrisleið innan ríkisfelagsskapin, ella sum onkur segði, framhaldandi skapa so nógv buldur ella konfrontatiónir at Føroyar fara úr ríkinum.

Hetta er í stuttum tað sum støða skal takst til á valinum tann 20. november.

Tað er eingin ivi um, at um vit vilja verða við í tí skjótt vaksandi globaliseringin sum hendir í okkara grannalondum, so skulu vit fyri ein og hvønn prís, verða verðandi í ríkinum, og hettar uttan mun til, um vit finna olju ella ikki.

Eg vil staðiliga heita á okkara landsmenn, sum vanligt, at lata vit og skil ráða, og velja loysnina innan ríkið, soleiðis at vit saman við Grønlandi og Danmark, skapa eina sterka eind í Norðatlantinum, mín rødd skal tosað fyri rættvísi, og framhaldandi menning av Føroyum, og tí stolta fólki, sum her býr.

# Fólkatingsvalið

**Sámal Petur í Grund**
*Valevni sjálvstýrsisfloksins*



Sjálvstýrisflokkurin hevur valt at stilla upp til fólkatingsvalið, hóast flokkurin í síni stevnu hevur, at fólkatingsumboðanin eigur at vera tikin av.

Henda greiða støða sjálvstýrisfloksins skal síggjast í ljósinum av, at vit meina at í Føroyum eiga føroyingar at ráða.

Tann dag tá evsta vald liggur heima hjá okkum sjálvum, skulu vit ikki sita í lóggevandi tingi í nøkrum øðrum landi, men samstarva á jøvnum føti við aðrar tjóðir í teim altjóða ráðum og nevndum sum til tað tíð eru.

So leingi sum vit eru partar av danska ríkinum og viðurskifti føroyinga verða viðgjørd á danatingi, so er tað umráðandi at vit eru har.

Sjálvstýrisflokkurin fer sjálvandi at vera varin tá donsk viðurskifti burturav verða viðgjørd, men eingin ivi skal vera um, at vit fara at gera okkara skyldu sum partur av lóggevandi tinginum í Danmark.

**Ríkisrættarliga støðan.**
Í hesum tíðum, hvar vit eru í ferð við at fremja tað ríkisrættarligu stevnu, sum hevur verið stevna sjálvstýrisfloksins síðani flokkurin sá dagsins ljós fyri knapt hundrað árum síðani, er tað sera umráðandi at okkara umboð eru á fremstu røð.

Tað at tryggja at yvirgongdin frá einum blandaðum stýri, hvar tað mangan er ógreitt um lóggevandi kompetansan liggur í Danmark ella í Føroyum, verður so varðislig sum gjørlig er okkara mál.

At hendan gongdin er varðislig er líka so umráðandi, sum tað er umráðandi at vit greiða øll okkara viðurskifti á ein hátt, hvar eingin ivi er um, at eingin myndugleiki er yvir Føroya Løgtingi.

Søga okkara vísir okkum, at tann mangan spottaði stig fyri stig politikkurin, hóast alt er tann einasti sum roynist.

Og hví so ikki halda seg til tann flokk sum hevur hendan politik sum kjarnu í sjálvum ríkisrættarliga spurninginum.

Sjálvstýrisflokkurin er ein miðflokkur, tað vil siga, sum søgan enn einaferð kann vísa okkum, at hann er í standi til at samstarva tvørtur um hugsjónarligu mørkini í einum lóggevandi tingi.

Hvør kundi til dømis hugsa sær, at Sambandsflokkurin ella Fólkaflokkurin fór at samstarva við eina vinstrahalla stjórn.

Ella hvør kundi hugsa sær, at Javnaðarflokkurin ella Tjóðveldisflokkurin fór at samstarva við eina borgarliga stjórn.

Nei hesir flokkar taka hugsjónarliga samleika sín við sær, og hann forðar teimum í at samstarva til báðar síður.

Sjálvstýrisflokkurin harafturímóti stendur frítt stillaður, tí hann er ein miðflokkur og kann til eina og hvørja tíð velja hvørja síðu hann vil samstarva við.

Henda sannroynd er størsta trygdin fyri at óansæð um Danmark fær eina vinstrahalla, ella høgravenda stjórn, so verður føroyska umboðanin ikki sett uttanfyri ávirkan.

Vit koma heldur ikki í klemmu, tá álitispostar skulu veljast í tinginum, men standa frítt stillaðir hugsjónarliga, tá vinstra og høgra dystast.

Hetta kann gera, at Sjálvstýrisflokkurin kemur at standa í eini lyklastøðu, sum kann vera okkum, og øllum Føroyum ein styrki, sum hinir flokkarnir ikki hava.

**Hvat fer sjálvstýrisflokkurin so at virka fyri á Fólkatingi?**
Flokkurin fer, at tryggja at sjálvstýristilgongdin verður framhaldandi og varðislig, soleiðis at føroyska samfelagið, so hvørt sum vit eru før fyri tí, taka ábyrgd av øllum málsøkjum okkara.

Fýra ára skeiðið sum liggur fyri framman, er eitt tíðarskeið sum uttan iva, á ein serligan hátt, kemur at vera tídningarmikið fyri føroya land.

Bæði føroyingar og danir ynskja, at vit leggja í fastar rammur hvussu ríkisrættarligu viðurskifti okkara skulu vera í framtíðini. Hvørgin parturin kann liva við teim afturvendandi ósemjum sum stinga seg upp, og hava stungið seg upp, síðani politiska medvit føroyinga mentist fyri gott 100 árum síðani.

Í hesi sjálvstýristilgongd sum nú er komin so langt, at einki er at gera uttan at halda kós og ferð, eru nógvir træðrir sum skulu greiðast.

At væl verður ansa eftir í hvørjum smáluti er umráðandi, og teir eru nógvir.

Á almanna- og heilsuøkinum og innan undirvísingarøki eru stórar avbjóðingar mótvegis donsku stjórnini.

Eitt mál, sum hevur stóran týdning fyri alt føroya fólk er yvirtøkan av flogvøllinum. Hetta er eitt mál sum er reist fyri fleiri árum síðani, millum annað í tíðini hvar Sjálvstýrisflokkurin umsat samferðslumál í landsstýrinum.

Umráðandi er at gera danir varar við sínar skyldur í hesum máli. Tað er eingin ivi um, at í tí tíðini teir hava umsitið flogvøllin, sum føroyingar fingu frá eingilsku stjórnini eftir krígslok, hava teir latið verið við at prioriterað og uppnormerað vøllin, soleiðis at hetta høvuðsportrið føroyinga til útheimin kann teljast millum fremstu flogvallir í heiminum.

Tá bert ein flogvøllur er í Føroyum, og tí allir flúgvandi borgarar bæði út av landinum og til landið, skulu um hetta punktið, so er tað avgerandi fyri okkum at alt virkar sum tað skal, so funktionelt og við so stórum regularitetið sum tað yvirhøvur letur seg gera.

Í tílíkum førum vil tað vera ein fyrimunur at vera umboðaðir báðu megin borðið.

Sjálvstýrisflokkurin hevur í føroyskari politiskari søgu verið tann flokkurin sum tíðast hevur verið við at mynda stjórn. Hetta tí hann hugsjónarliga liggur á miðjuni. Stórsta trygd fyri at føroyingar fáa ávirkan á eina komandi stjórn í Danmarkført tú, við at velja Sjálvstýrisflokkin, ella eitt av umboðum floksins til fólkatingsvalið 20.novembur.

**Trúskapur ímóti sær sjálvum.**
Tað eru tey sum halda, at ein atkvøða til Sjálvstýrisflokkin ikki kemur til sættis, tí tað verður ein av teim størru flokkunum sum fer avstað við manninum.

Henda hugsjón byggir á trongdina til at raka rætt; tað vil siga at vera við at velja hann sum kemur inn.

Hetta er ikki ein hugsjón sum ber politiskt og sigur hvat tað tú sum veljari vil, men heldur eitt spæl, hvar tú hevur møguleika fyri at raka rætt, ella feila.

Trúgvur ímóti hugsjón tíni setir tú krossin har sum tú heldur at júst tíni sjónarmið vera best røkt. Einans tá verður rødd tín hoyrd og tú verður ein partur av demokratisku myndini í landi okkara.

Velur tú at seta krossin eftir sannføring tíni, so feilar tú ongantíð, men kemur altíð at raka rætt.

Um tað verður eitt av okkara umboðum sum kemur í danska fólkatingi ella ikki liggur í tínum hondum tann 20.novembur.

Eg fari Sjálvstýrisins vegna og fyri mín part, at heita á teg um at seta krossin við Sjálvstýrisflokkin ella eitt av valevnum floksins. Gott val.

Sosialurin
Lesið Sosialin
-tað loysir seg!






# Altjóða diabetesdagur

**Diabetesfelag Føroya**
*Kristiana Rein*

14. november er altjóða diabetesdagur.

Tá eru 10 ár liðin síðan WHO og IDF, Altjóða Diabetesfelagið, gingu saman um at gera vart við ein vaksandi, altjóða trupulleika: at sjúkan diabetes gongur fram við risastigum.

Dagurin 14. november varð valdur, tí hetta er føðingardagurin hjá Frederick Banting, sum saman við Charles Best í oktober 1921 uppdagaðu insilinið. Tástaðni var møguligt at staðfesta orsøkina til diabetes ella sukursjúku, sum annars hevur verið kend í øldir.

Eitt av fremstu londum í heiminum bæði at granska í diabetes og at framleiða insulin hevur síðan 1921 verið Danmark.

Hesin vaksandi trupulleikin, at tað vera alt fleiri fólk, og tey eru yngri og yngri, sum fáa sjúkuna diabetes, hevur verið vístur á nú í fleiri ár. Fleiri kanningar hava víst, at hesar framrokningar eru rættar. Soleiðis eisini nú ein kanning í Noregi, sum vísa " sjokktøl" at,

- 10 % av øllum monnum millum 40 og 60 ár hava diabetes, typu 2
- talið er nakað lægri fyri kvinnur í sama aldri.

Næsti spurningur er so, um tað ber til at fyribyrja hesa sjúku?

Ja, í stóran mun, vísa tvær stórar kanningar, ein í Finlandi og ein í USA.

Henda fyribyrging hongur nógv saman við rørslu og kosti.

So kanska hevði tað verið eitt hugskot,

- at skúlabørn fáa fleiri fimleikatímar
- læra meira um kost í skúlanum og
- allarbest um tey fingu heilsugóðan kost á skúlanum.

Sosialurin
Sosialurin
i




Restorffs ASSU




**Jólaborð & dansur**
**á Hotel Norð**

**8. desember skipar Hotel Norð fyri jólaborðhaldi.**

**Nógvir ymiskir rættir: dunna, fleskasteik, ræst kjøt og súpan, og mangt annað.**

**Undir borðhaldinum verður mótasýning og felagssangur.**

**Steintór og Ingi skipa fyri**

**Aftaná borðhaldið spæla Millum Frændir til dans**

**Busssamband til og úr Klaksvík**

**Kostnaður 300,- írokna vælkomstdrikkur**

**Tilmelding innan hósdagin 6. desember kl. 12.00**



**Hotel Norð**



Tel 451244 Fax 451245 FO 750 Viðareiði